

*Felagsnevnarin í kristna heiminum, krossurin, handan tveir leiðarar í Filadelfia og Rhema, sum nú leggja saman. Tummas Jacobsen úr Filadelfia høgrumegin og Jónfinn Olsen úr Rhema vinstrumegin gleða seg til nýggja samstarvið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Saman standa vit sterkari

**Tær báðar samkomurnar í Tórshavn, Rhema og Filadelfia, boðaðu í tíðindaskrivi fyrst í hesi vikuni frá, at tær nú leggja saman. – Fyri 10 árum síðani høvdu samkomurnar ymsar fatanir viðvíkjandi trúarspurningum og framferðarhátti, men nú eru samkomurnar vorðnar so eins, at vit meta tað vera rætt og náttúrligt at leggja saman, sigur Tummas Jacobsen, leiðari í Filadelfia**

SAMANLEGGING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Nú er tað ikki bert í vinnulívsheiminum, at samanleggingar eru sjónligar. Tær báðar samkomurnar í Havn, Filadelfia á Landavegnum og Rhema uppi á Hálsi, boðaðu í vikuni frá, at tær nú leggja saman.

## Rhema í søguna

Navnið Filadelfia heldur fram, og øll fara tey at hússast í Filadelfia-salinum við Landavegin. Leiðslurnar greiða frá, at ongar broytingar vera í leiðslubygnaðinum í fyrstu syftu, tí leiðslan í Rhema ynskir heldur spakuliga at integrerast í Filadelfia uttan stórvegis broytingar.

Tummas Jacobsen, leiðari í Filadelfia, er glaður fyri samanleggingina, sum hevur verið í umbúna eini 2-3 ár. Í løtuni hava umleið 150 fólk sína dagligu gongd í Filadelfia, meðan um 50 fólk hoyra til Rhema. Sostatt fer Filadelfia nú at hýsa umleið 200 fólk.

– Enn er salurin nóg stórur, og tí verður neyvan plásstrot fyrstu tíðina. Men um tað verður ov trongt í salinum, er hetta bert ein luksustrupulleiki, sum ein og hvør samkomuleiðari droymir um, sigur Tummas flennandi.

## Munirnir horvnir

Tummas Jacobsen sigur, at munirnir, sum vóru millum samkomurnar fyri umleið 10 árum síðani, nú eru horvnir, bæði í praktiskum framferðarhátti og í gudfrøðiligu læru- og trúarspurningunum.

– Saman standa vit sterkari, og samkomurnar eru vorðnar alt meiri líkar seinnu árini. Tí er samanleggingin náttúrlig fyri báðar partar, og vit meta, at samstarvið bert kann fáa positivar avleiðingar, sigur Tummas Jacobsen.

Spurdur, um tað tó ikki framvegis eru munir og ósemjur viðvíkjandi læru og framferhátti, sum kunnu volda trupulleikar, er Tummas greiður.

– Nei. Munirnir vóru sum sagt sjónligari fyrr, men nú eru samkomurnar eins á flest øllum økjum. Eingin orsøk er longur at hava tvær sjálvstøðugar samkomur, tá vit hava so nógv at savnast um, sigur Tummas Jacobsen.

## Rhema breyt frá

Talan er annars um ein øðrvísi søguligan uppruna millum samkomurnar báðar. Filadelfia er ein hvítusunnusamkoma, og Rhema er ein trúarsamkoma, sum breyt frá hvítusunnurørsluni miðskeiðis í áttatiárunum í Føroyum og stovnaði egið virksemi. Í Norðurlondum var sviin Ulf Ekmann ein av stigtakarunum til nýggju trúarrørsluna við íblástri frá Kenneth Hagin í USA. Oddamenninir í trúarrørsluni hildu, at hvítusunnurørslan var vorðin ov traditionell og stív, og tí valdu teir at ganga nýggjar leiðir. Í Føroyum var úrslitið av hesum ráki, at partur av hvítusunnurørsluni tók undir við trúarrørsluni, og soleiðis sá samkoman Rhema dagsins ljós. Men Tummas Jacobsen og aðrir hildu fast um hvítusunnusamkomuna.

– Tá nýggjar rørslur og nýggj rák fáa gjøgnumbrot, hava tey lyndi til at vera meiri víðgongd at byrja við, har munurin síðani minkar við árunum. Tað er júst hetta, sum er hent millum Filadelfia og Rhema, sigur Tummas Jacobsen.

Meðan trúarrørslan er relativt nýggj, skulu vit aftur til fyrst í 1900´talið at finna upprunan til hvítusunnurørsluna. Tað var amerikumaðurin T.B. Barrat, sum í 1906 grundlegði hvítusunnusamkomuna, og vann hvítusunnurørslan frama eini fimm ár seinni í Norðurlondum og um okkara leiðir.

## Altjóða rák

Sambært Tummasi Jacobsen eru samkomusamanleggingar eitt alsamt vaksandi rák í kristna heiminum, og alt fleiri samkomur finna nú saman aftur, sum skiltust orsakað av áðurnevndu orsøkum.

– Meðan heimurin gerst myrkari, lýsa ljósini bjartari saman, og tað er bert mennandi, at kristin finna saman í størri og sterkari eindir. Talan er um eitt globalt rák, sum nú eisini hevur gjørt seg galdandi í Havnini, greiðir Tummas frá. Umframt fólkakirkjuna eru tað bara missións- og brøðrasamkomurnar, sum enn ikki hava verið ávirkaðar av samanleggingum í eins stóran mun.

## FAKTA

Umleið 150 fólk hoyra til Filadelfia

Umleið 50 fólk hoyra til Rhema

Amerikumaðurin Kenneth Hagin var oddamaður fyri trúarrørsluni, sum breyt frá hvítusunnurørsluni, og Rhema var úrslit av hesum ráki í Føroyum miðskeiðis í 80´unum

Amerikumaðurin T.B. Barrat var undangongumaður fyri hvítusunnurørsluni fyrst í 1900´talinum



